# Handilstreytir fyri virðisbrøv

**Inngangur**
Hesar treytir eru galdandi, tá ið tú handlar við fíggjarligum tólum – harímillum virðisbrøv – gjøgnum Betri Banka P/F (hereftir Betri).

Handilstreytirnar byggja á Lóg um Virðisbrævahandil v.m. og tilhoyrandi kunngerðir um eitt nú góðan virðisbrævahandilssið. Harumframt eisini á viðtøkur fyri NASDAQ OMX Copenhagen A/S og etiskar reglur fyri keypsskálar.

Betri bjóðar handil við lánsbrøvum, partabrøvum og øðrum fíggjarligum tólum. Kundarnir kunnu fremja handlar við at venda sær til peningastovnin umvegis telefon ella netbankan. Betri mælir ikki til, at handilsordrar verða sendir umvegis teldupost, bræv ella telefaks, um ikki annað greitt er avtalað. Hetta orsakað av, at ein ordri verður mettur at vera tíðarkritiskur, og at teldupostar í ávísum førum ikki verða móttiknir og/ella lisnir alt fyri eitt.

Betri hevur flokkað kundar sínar soleiðis: detailkundar, professionellir kundar og góðkendir mótpartar. Betri kunnar teg um tína flokking í brævi.

Í viðgerð av ordrum frá detailkundum og professionellum kundum, er ordrafremjingar–politikkurin hjá Betri altíð galdandi.

**Virðisbrævahandilssløg**
Betri bjóðar í løtuni niðanfyri standandi virðisbrævahandilssløg

- Kommissiónshandil (marknaðarhandil og limithandil)

Í tann mun tað er gjørligt, fremja vit allar ordrar við Betri sum mótparti, um hetta ikki er ein vansi fyri teg.

**Kommissiónshandil**
Ein kommissiónshandil verður vanliga avgreiddur sum ein marknaðarhandil, har Betri handlar við ein annan marknaðarluttakara tína vegna. Handilin verður avroknaður til ein kurs, sum í handilsløtuni ongantíð er verri enn kursurin á marknaðinum.

Tá tú handlar í kommissión gerst Betri vanliga partur av handilinum við at gerst tín mótpartur (í handlinum). Hetta sæst á tíni handilsnotu. Betri kann bert gerast tín mótpartur undir somu treytum, sum tað annars verður handlað undir í marknaðinum. Tískil kann hetta hvørki hava við sær, at tú fært eitt tap ella fyrimun, tá ið Betri gerst ein partur av handlinum.

Um einki boð og/ella útboð er komið á minst einum handilsposti á handilsskipanini hjá NASDAQ OMX Copenhagen A/S, tá ið handilin skal fremjast, kann Betri velja at áseta kursin við støði í eini meting av best møguliga kursi, grundað á hvussu umsetilig virðisbrøvini eru og tað galdandi kursvirðið í marknaðinum sum heild. Um kursurin er ásettur við støði í eini meting sæst hetta á tíni handilsnotu.

Ordrar í kommissión kunnu býtast sundur ella savnast og handlast til ymiskar prísir í gjøgnum dagin, um tað ikki er møguligt at avrokna allan ordran í einum í marknaðinum.

Partabrøv verða handlað í tí raðfylgju, sum handilsordrar koma inn, um kursurin er hin sami. Tí kann tað koma fyri, at handlar, hóast teir hóska saman við handilsordrum á marknaðinum, ikki verða avroknaðir. Ein orsøk kann vera tann, at handilsordrin ikki er nóg frammarlaga í raðfylgjuni. Eisini kann koma fyri, at handilsordrin verður partvíst avroknaður.

betri

**Betri Banki P/F**
Postboks 34
Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 348 000
banki@betri.fo
www.betri.fo

Um ikki annað er avtalað í sambandi við móttøku av handilsordra, fellur handilsordrin burtur um so er, at handilsordrin ikki verður avgreiddur tann dagin, hann verður lagdur inn í handilsskipanina hjá keypsskálanum. Um bert ein partur av handilsordranum verður avgreiddur, fellur tann parturin av handilsordranum burtur, sum ikki er avgreiddur uttan so, at annað er avtalað.

**Alment um limithandil**
Viðvíkjandi ordrum um keyp/sølu av virðisbrøvum, har tú í sambandi við keyp biður um ein hámarkskurs, og við sølu ein lágmarkskurs, er galdandi, at handilsprísurin skal lúka tann limiteraða (avmarkaða) kursin, íroknað møgulig ískoyti/frádráttir hjá Betri, men uttan kostnað áðrenn handilin verður framdur. Um Betri, orsakað av marknaðar viðurskiftum, ikki kann handla innan 8 børsdagar, fellur limiteraði (avmarkaði) ordrin burtur, um eingin onnur avtala er gjørd.

Viðhvørt kunnu frávik verða gjørd í omanfyri nevndu avrokningargrundreglu. Undantaksstøður kunnu millum annað koma fyri í serligum marknaðarviðurskiftum ella viðvíkjandi virðisbrøvum, har tað ikki er støðugur handil. Um eitt undantak verður gjørt, sæst hetta á tíni handilsnotu.

Um ein limit ordri viðvíkjandi partabrøvum, ið eru tikin upp til handil á einum reguleraðum marknaði, ikki verður framdur alt fyri eitt eftir galdandi marknaðartreytum, roynir Betri at fremja ordran skjótast gjørligt. Hetta verður gjørt við beinanvegin at almannakunngera limit kundaordran á ein tílíkan hátt, ið gera upplýsingarnar lætt atkomiligar fyri aðrar marknaðarluttakarar, um tú ikki greitt hevur avgjørt annað.

Betri kann krevja eitt gjald fyri limit ordrar, óansæð um handilin verður framdur ella ikki.

**Handil við virðisbrøvum, ið eru skrásett á útlendskum keypskálum**

Útlendsk virðisbrøv kunnu bert handlast sum marknaðarhandil ella limithandil.

Gjaldoyrakursurin á handli við útlendskum virðisbrøvum verður ásettur við støði í skrásetingini hjá Tjóðbankanum tá handlað verður, íroknað ískoyti/frádrátt hjá Betri, um ikki annað er avtalað. Hareftir fært tú eina handilsnotu, ið er galdandi fram um eina møguliga fyribils notu.

**Handil við óskrásettum virðisbrøvum**
Handil við óskrásettum virðisbrøvum er altíð ein kommissiónshandil.

**Ordrafremjingarpolitikkur**
Tá ið Betri fremur tín virðisbrævaordra, verður hetta altíð gjørt í samsvari við okkara galdandi Ordrafremjingarpolitikk, um ikki onnur avtala er gjørd. Ordrafremjingarpolitikkurin sæst á heimasíðu bankans www.Betri.fo.

**Handil við íløguprógvum**
Betri hevur skyldu til at kunna teg um, hvørt vit fáa vinning ella provisjón frá útbjóðarum av fíggjarligum tólum og í hvønn mun Betri móttekur provisjón frá íløgufeløgum. Hetta kemur fyri, tá talan er um ávís íløguprógv. Í hvønn mun Betri móttekur vinning ella provisjón, sæst á www.Betri.fo.

**Gjaldoyrakursir**
Gjaldoyrakursurin á handli við útlendskum virðisbrøvum verður ásettur við støði í skrásetingini hjá Tjóðbankanum tá handlað verður, íroknað viðbót/frádrátt hjá Betri, um ikki annað er avtalað.

**Prísir**
Tá tú keypir ella selur virðisbrøv, skalt tú gjalda kostnað til Betri. Kostnaðurin verður ásettur við støði í kursvirðinum. Tá ið tú keypir, verður kostnaðurin lagdur afturat avrokningini og tá ið tú selur, verður kostnaðurin drigin frá avrokningini.

Treytað av handilsháttinum kunnu viðbøtur ella frádráttir verða í kursinum. Kostnaður, viðbøtur, frádráttir og møguligir aðrir kostnaðir síggjast á tíni handilsnotu.

Galdandi prísir síggjast á tí til eina og hvørja tíð galdandi príslistanum hjá Betri, sum sæst á heimasíðu bankans www.betri.fo.

**Serlig viðurskifti**
Undir serligum umstøðum tilskilar Betri sær rætt til ikki at fremja ein ordra frá tær. Tað kann t.d. vera, tá ið kursmunurin millum boð og útboð er ov stórur, tá ið eingin kursur er, ella tá ið eingin støðugur handil er í ávísa virðisbrævinum. Betri

kann velja at útseta ella ógilda tín ordra. Um ordrin verður ógildaður, fært tú boð um hetta.

Støðugur handil skal skiljast sum ein áhaldandi handil við einum ikki ótýðandi umsetningi , har galdandi prísir á ávísum virðisbrøvum vanliga verða útbjóðaðir dagliga.

**Avgreiðsla á virðisbrævahandlum**
Avgreiðsla skal skiljast sum gjald fyri og útvegan av handlaðum virðisbrøvum.Er talan um virðisbrøv skrásett á NASDAQ OMX Copenhagen, er avgreiðsludagurin, um ikki annað er avtalað, annar børsdagur eftir handilsdagin. Avgreiðsludagurin fyri virðisbrævahandil er eisini valørdagur/ rentudagur.

Á útlendskum virðisbrøvum eru serligar freistir og reglur galdandi, ið tú kanst fáa upplýst í Betri.

Vit útflýggja virðisbrøv, ið tú hevur keypt, treytað av, at tú rindar avrokningarupphæddina í seinasta lagi avgreiðsludagin. Vanliga kanst tú ráða yvir keyptum virðisbrøvum, ið eru skrásett á VP, annan bankadag eftir avgreiðsludagin.

Dagin fyri avgreiðsludagin mugu eingi rættindi, ið ávirka søluna, vera skrásett yvir virðisbrøvunum, eitt nú veðseting ella keypt virðisbrøv, ið tú enn ikki ræður yvir.

Um ein handil ikki kann fremjast á avgreiðsludegnum orsakað av, at tú ikki ert førur fyri at gjalda ella at útvega virðisbrøvini, hevur tú endurgjaldsskyldu eftir vanligum føroyskum rættarreglum. Á handlum, sum verða framdir í kommissión, átekur tú tær váðan fyri, at tann parturin, sum Betri hevur handlað við, kann gjalda ella útvega virðisbrævið.

Vit vísa somuleiðis til okkara goymslutreytir.

**Leggja ordrar saman**
Sambært vanligum mannagongdum kunnu ymiskir kundaordrar ella handlar verða lagdir saman, tá ið Betri veitir tær eina tænastu. Hetta kann m.a. koma fyri, tá ið støddin á kundaordranum ikki samsvarar við vanligu umsetninginsstøddini á viðkomandi marknaði. Hetta er oftast ein fyrimunur fyri teg, men treytað av ítøkiligum umstøðum viðvíkjandi einum ávísum ordra, kann tað tó eisini gerast ein vansi fyri teg.

Tá ið Betri leggur saman kundaordrar, skal tað ikki hava neiliga ávirkan á ordrar, ið verða avgreiddir seinni.

**Handilsnota og váttan**
Tá ið Betri tína vegna hevur framt ein ordra fært tú skjótast gjørligt tær mest týdningarmiklu upplýsingarnar um handilin.

Betri tilskilar sær rætt til at veita upplýsingar við standardkodum.

Um tú ert flokkaður sum detailkundi, senda vit tær eina avrokningarnotu í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir, at ordrin er framdur. Um Betri móttekur váttan frá triðjamanni, senda vit notuna í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir, at vit hava móttikið váttanina.

Tá ið tú keypir ella selur lánsbrøv í sambandi við veðseting av fastari ogn, kann Betri senda neyðugu upplýsingarnar um fremjingina og avrokningarnotuna saman við øðrum upplýsingum viðvíkjandi láninum, tó í seinasta lagi ein mánað eftir at handilin er framdur.

Í ordrum frá einum detailkunda í sambandi við pørtum í íløgufeløgum og pørtum í øðrum stovnum viðvíkjandi felagsíløgum, ið verða framdar regluliga, sendir Betri annað hvørt avrokningarnotur ella upplýsingarnar um fremjingina av ordrum í minsta lagi sætta hvønn mánað.

Viðvíkjandi serligum fíggjarligum tólum, so sum futures, optiónir ella líknandi tól, fært tú upplýsingarnar í tann mun, tað er gjørligt og viðkomandi. Eisini verður atlit tikið til marknaðarsiðvenjur og tey viðurskifti, sum hesi fíggjarligu tól verða handlað eftir.

Tá ið tú biður um tað, gevur Betri tær eina støðufráboðan viðvíkjandi ordranum.

Um tú ynskir tað, hevur Betri skyldu at veita neyðugar upplýsingar um faktuell viðurskifti í sambandi við tann ítøkiliga virðisbrævahandilin.

**Mótmæli viðvíkjandi handilsnotum og váttanum v.m**
Um tú ynskir at mótmæla innihaldinum í tíni handilsnotu, ella um tú ikki hevur móttikið notuna, skalt tú alt fyri eitt boða okkum frá. Um tú kærir ov seint, kann tað hava við sær, at Betri ikki fær ábyrgd av einum møguligum skaða, sum ikki hevði komið fyri ella hevði verið avmarkaður, um tú hevði vent tær til okkum í góðari tíð.

**Strika feilhandlar**
Betri tilskilar sær rætt til at strika gjørdar handlar, um so er, at talan er um eitt mistak. Feilhandil skal skiljast sum ein handil, har tað í sambandi við útvegan, sølu ella prísásetan á viðkomandi handilsstaði hevur verið talan um eitt mistak, sum mótparturin alt fyri eitt hevur gjørt vart við.

Um viðkomandi handilsstað tekur avgerð um at strika ein handil, flytur Betri aftur viðkomandi tól og ognir til partarnar. Um tín handil verður strikaður, fært tú boð um hetta skjótast gjørligt. Um tú ynskir at fremja ordran umaftur, skalt tú seta teg í samband við Betri.

**Handil við pensjónspeningi og pensjónsgoymslum** Tú skalt vera serliga varug/ur við reglurnar viðvíkjandi at seta tína pensjón í virðisbrøv. Kunngerð nr. 964 frá 11. august 2010 for Færøerne om puljepension og andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v. ásetur millum annað, at tú í mesta lagi kanst seta 20 % av virðinum á tíni pensjónsuppsparing í partabrøv, ábyrgdarkapital v.m., sum sama felag hevur givið út. Vit viðmæla tískil, at tú leitar tær ráðgeving, um so er, at tú ert í iva um, hvørt tínar íløgur viðvíkjandi pensjónsuppsparingini eru sambært ásettum reglum.

Ein upphædd svarandi til ásetta ársinngjald á kapitalpensjón, er tó altíð loyvd at seta í eitt felag.

**Navnaskráseting**
Øll donsk partabrøv og íløguprógv verða vanliga navnaskrásett. Um tú ikki ynskir hetta, skalt tú boða okkum frá, tá ið tú gevur boð um ordran. Tað er ikki møguligt at navnaskráseta partabrøv ella íløguprógv, tá talan er um handil á útlendskum keypsskálum.

**Viðgerð av persónsupplýsingum**
Í sambandi við handil við fíggjarligum tólum, savnar og viðger Betri tær persónsupplýsingar, ið eru neyðugar í sambandi við fremjing av tí einstaka handlinum ella veitingini av íløguráðgeving. Betri kann geva hesar upplýsingar til almennar mynduglBetriar sambært serligum lógarkrøvum.

**Upptøka av telefonsamrøðum**
Fyri at tryggja at tínir ordrar verða rætt avgreiddir, kann Betri velja at banda telefonsamrøður viðvíkjandi handlum við virðisbrøvum og fíggjarligum tólum.

**Force majeure**
Betri átekur sær onga ábyrgd viðvíkjandi møguligum skaðum, ið stava frá einum útlendskum ella føroyskum umboði í sambandi við fremjing av eini uppgávu fyri Betri. Hetta er somuleiðis galdandi viðvíkjandi skaðum, ið stava frá børs, clearing-/ virðisbrævamiðdeplum ella líknandi stovnum.

**Eftirlit**
Betri er ein fíggjarlig fyritøka, ið er góðkend av:
**Finanstilsynet**
**Århusgade 110**
**2100 København Ø**

**Lógarval**
Møgulig trætumál í millum teg og Betri verða avgjørd sambært føroyskari lóg, og avgerðir skulu fellast av Føroya Rætti.

**Broytingar í hesum treytum**
Betri tilskilar sær rætt til at broyta handilstreytirnar uttan ávaring, um broytingarnar eru til tín fyrimun. Betri kann eisini broyta handilstreytirnar við eini hóskandi freist í samsvar við vanligu viðskiftatreytir peningastovnsins ella sambært áseting í lóg ella øðrum almennum reglum.

Møguligar broytingar verða fráboðaðar á www. betri.fo.

**Aðrar treytir**
Umframt hesar treytir, verður víst til goymslutreytirnar hjá Betri og vanligar viðskiftatreytir í Betri, í tann mun tær ikki víkja frá hesum treytum.

**Gildiskoma**
Hesar handilstreytirnar eru galdandi frá 1. januar 2011.